# Frisørskúlin 2

Lær at seta hárið sjálv. Kristin Bjørk Tungá, frisørur, vísir, hvussu vit lætt, skótt og bíliga kunnu fiksa okkum sjálvar ella vinkonurnar upp. Hesaferð lærir Kristin Bjørk okkum at krúlla hárið við slættijarninum, og síðan at seta tað upp við hár klemmum.
Kristin Bjørg virkar sum frisørur hjá Kvilt á Áarvegnum og í Hósvík. Hon nýtir eitt vanligt slættijarn, sum fæst til keyps allastaðni. Krúllurnar halda betur um tú sprayar eitt sindur av lakki í lokkarnar áðrenn og aftaná.



*Kristin Bjørk Tungá og Frida Poulsen*

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

1. Frida Poulsen hevur myrkt, slætt hár. Tak ein lokk fyri og annan eftir..
2. .. snara jarninum..
3. .. bend upp og toga út..
4. .. lofta purluni varliga við hondini..
5. .. og halt framm allan vegin runt. Allar krúllurnar nýtast ikki at venda sama veg.
6. Tað er lætt at seta krúllað hár upp.
7. Tak ein lokk í senn og fest við hárklemmum uppi á høvdinum.






*Kristin Bjørk Tungá er umboð fyri hárvørurnar Tigi, sum hon brúkar í greinini*